

*Henning Jacobsen, verkfrøðingur*

*Mynd: Bárður*

nar hjá SEV:

# ð verandi oljuprísum

hevur havt standandi í Neshaga seinastu 12 árini, hevur roynst ógvuliga væl, og hon hevur lítið og einki kostað í viðlíkahaldi.

- Vit vóna, at nýggju vindmyllurnar, sum Vestas hevur selt okkum, fara at roynast líka væl sum hin gamla.

Tað væntar verkfrøðingurin eisini, tí vindmyllur av hesum slagnum eru seldar og standa uppi kring um heimin.

Henning sigur, at vanliga verður roknað við, at hesar myllur kunnu koyra í eini 20 ár uttan stórvegis trpulleikar.

## Fleiri myllur

Spurdur, um hann væntar, at SEV fer at gera nýggjar íløgur í vindmyllur í næstum, sigur hann, at tað avgjørt ikki er óhugsandi.

Hann vísir tó á, at SEV í løtuni arbeiðir við eini nýggjari vatnorkuútbygging til Eiðisverkið, og hetta er ein tunnil, sum ætlanin er at bora av Norðskálaleiðini til Selatraðar.

- Men tað er als ikki óhugsandi, at SEV fer undir eina nýggja vindmyllu-verkætlan í næstum.

Nær ein nýggj ætlan kann fyriliggja, dugir Henning Jacobsen ikki at siga, men spurdur, um talan kann vera innan næstu tvey árini, endurtekur hann, at tað er als ikki óhugsandi.

Sum verkætlanarleiðari, er hann væl nøgdur við arbeiðið, sum gjørt er í Neshaga.

Henning Jacobsen:

# Vit sleppa ikki undan motorum

**- Vit kunnu ikki siga, at tað skal vera "antin ella". Vit hava brúk fyri bæði motorum, vatni og vindi, sigur Henning Jacobsen, verkfrøðingur hjá SEV**

ORKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Henning Jacobsen, verkfrøðingur hjá SEV, sigur, at hóast SEV nú bæði ger nýtslu av vatnorku og vindorku, slepst ongantíð undan eisini at hava motorar, sum brenna olju – hóast oljan er dýr og dálkar umhvørvið.

## Ikki "antin ella"

- Vit kunnu ikki siga, at tað skal vera "antin ella", sigur hann og vísir á, at vindorkan gevur einki, tá ið eingin vindur er – og vatnorkan megnar ikki at bera alt kervið. Vit hava brúk fyri bæði motorum, vatni og vindi.

Henning Jacobsen leggur dent á, at tað altíð verður soleiðis, at SEV eisini fer at hava motorar sum framleiða orku.

- Hinvegin er rákið, at vit øll skulu ganga betur um umhvørvið við dálking, og tí er tað at fegnast um, at vindorkan nú er vorðin ein størri partur av orkuframleiðsluni hjá elfelagnum, sigur hann.

## SEV og netið

Verkfrøðingurin sigur, at ein annar spurningur, sum tekur seg upp, er, hvussu nógv verandi net hjá SEV kann gera.

- Vit kunnu siga, at vit eru í eini royndartíð, sum sær áhugaverd út. Tá ið ein tíð er umliðin, kunnu vit betur taka saman um og siga, at soleiðis er støðan í løtuni, sigur Henning Jacobsen.



*- Rákið er, at vit øll skulu ganga betur um umhvørvið, men motorunum slepst ikki undan, sigur Henning Jacobsen, verkfrøðingur hjá SEV*